Veiðimentan í Útnorðuri:

# Frálík framsýning



*Tað modernaða og tøkniliga verður eisini víst á framsýningini, Veiðimentan í Útnorðuri*



*Føroyski útróðrarbáturin er eisini við á framsýningini við eftirgjørdari manning í føroyskum klæðum*



*Í øllum síni líki er ísbjørnin hugvekjandi. Børn fáa eisini møguleikan at droyma seg burtur á framsýningini*

**The main atraction í Norðurlandahúsinum hesar dagarnar er stórfingna framsýningin um veiðumentan í Útnorði**

FRAMSÝNING

*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir:Finnur Justinussen*

Í hesum døgum er forkunug framsýning í Norðurlandahúsinum. Talan er um framsýningina Hunters of the North ella Veiðimentan í Ùtnorðuri, sum føroyski heitið er.

Talan er um ein stóra framsýning, sum sýnir

Veiðimentan í Útnorðuri er verkætlan, sum sýnir trý lond, Grønland, Ísland og Føroyar, sum í øldir hava livað í og við eini veiðimentan og gera tað enn, hóast tey eru háteknologisk samfeløg.

Verkætlanin er ferðandi framsýning, sum letur upp í Norðurlandahúsinum í Føroyum hin 15. juni 2002. Síðani verður ferðast til Sumberg Head í Hetlandi, Dublin í Írlandi, Reykjavík og Akureyri í Íslandi, Nuuk í Grønlandi, St. John's í New Foundlandi og Aberdeen í Skotlandi, skrivar Norðurlandahúsið.

Tað tykist tó í stóran mun at vera Føroyar og Grønland, ið verða settar í fokus. Í øllum førum fyllir hesi ein stóran part av framsýningini.

Framsýningin hýsir hálvfems ymsum ymiskum lutum. Lutirnir fevna rættiliga víða í skapi og vavi; alt frá einari útstappaðari haru til eina stóran Erró málning, ið avgjørt telist millum teir mest forkunnugu lutirnar.

Sagt verður, at framsýningin tekur støði í trimum tættum:listarligum, fólkaminnisfrøðiligum og teknologiskum. Í allar mátar livir framsýningini eisini upp til tað, ið lovað verður. Heildarkenslan tú fært er ógvuliga góð. Norðurlandahúsið hevur latið síni bestu hølir til tiltakið, og tað merkist eisini. Rúmið er ógvuliga uppset við ljósi. Stemn-ingurin verður ógvuliga friðsælur og konsentraraður, har alt tykist at finna saman í eina eind.

Støði tykist í allar mátar at vera høgt. Veiðimentan tykist í stóran mun at vera umboðað, men tað er sjálvandi ein ómøgulig uppgáva fult at siga frá øllum í teimum trimum londunum.

Tað mest hugvekjandi við framsýningini er mátin, ið tann nýggi tøknin saman við eldru lutum tykist at fella saman í eitt.

Longu nú hava hópin av fólki vitjað framsýningina, og tað vera óivað mong afturat, sum fara at vitja.

# Bygningurin reistur



*Tórshavnar Skipasmiðja ger nýggjan smiðju- og goymslubygning*

Arbeiðið hjá Tórshavnar Skipasmiðju við at gera ein nýggjan goymslu- og smiðjubygning er nú komið so mikið áleiðis, at bygningurin nú er reistur. Talan er um økið, har gamli fiskasentralurin plagdi at halda til.

Tórshavnar Skipasmiðja ger ein 1.800 fermetrar stóran bygning á økinum.

Gunnar Mohr, stjóri, sigur, at hetta vil betra umstøðurnar hjá teimum munandi. Tað verður léttari, skjótari og meiri høgligt at arbeiða, og vit hava eisini fingið eina størri og nýmótans smiðju, sigur hann.

Eftir ætlan verður arbeiðið liðugt við ársenda.

**-HR**



# Teir asfaltera í Vágatunlinum



*Teir eru farnir undir at asfaltera inni í Vágatunlinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Arbeiðið inni í Vágatunlinum er komið so mikið væl áleiðis, at farið er undir at leggja fyrsta asfaltlagið á vegbreytina. Tíðarætlanin heldur**

TUNNILSGERÐ

*Edvard Joensen*

Teir hava asflterað ein part av vegbreytini í Vágatunlinum. Onnur síðan av breytini hevur fingið fyrsta fyribilslagið álagt soleiðis umleið ein kilometur inn í tunnilin, sigur Hermann Lindberg hjá NCC.

Hermann Lindberg sigur, at teir eru komnir umleið í helvt við at gera vegbreytina lidna. Tað vil siga, at teir byggja breytina upp frá grundini av. Leggja frárensl og rør til ymsar leiðingar í, eins og nýtt tilfar verður lagt til sjálva koyribreytina, áðrenn asfalterast skal.

Rør og brunnar, sum skulu liggja í vegbreytini, eru liðug, sigur Hermann Lindberg.

NCC ger breytina, meðan Landsverkfrøðingurin stendur fyri asfalteringini.

Tað næsta, sum NCC skal undir, er at vatntryggja loftið. Tað vil siga at leggja fóðringar undir loftið, so vatnið verður leitt út í síðurnar og rennur burtur gjøgnum tær leiðingar, sum gjørdar eru til tað. Okkurt skal stoypast í stóra brunninum, og so verður tað arbeiðið liðugt. Sum skilst á Hermanni Lindberg, verður tað heilt skjótt. Eftir er so hjá NCC at gera portalarnar við báðar munnarnar.

Niclas Foldbo, byggileiðari hjá P/F Vágatunlinum, sigur, at arbeiðið inni í tunlinum gongur eftir ætlan.

Tíðarætlanin, sum sett er til hálvan februar komandi ár, fer at halda, sigur hann, men ásannnar kortini, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri allar partar, um liðugt var fyrr. Men at fáa hann at siga nakað um, hvørt tað møguliga verður fyrr liðugt, ber bara ikki til.

Niklas Foldbo sigur, at kaðalarbeiðið inni í tunlinum gongur sum ætlað. Rør eru løgd at draga kaðalar ígjgønum. Bæði til veikstreym og sterkstreym, sigur hann.

Tað er eitt danskt-føroyskt samtak, sum hevur fingið arbeiðið at gera. Danska felagið eitur KB Elteknik, og hevur deild í Føroyum, sum eisini er autoriserað, meðan Thorvald Gaardlykke er føroyski parturin í samtakinum.

Kostnaðurin fyri tann partin av tunnilsgerðini fer at liggja um 12 milliónir krónur, sum liggur rættilgia nær tí, mett varð frammanundnan, sigur Niklas Foldbo. Kaðalarbeiðið verður væntandi liðugt samstundis sum restin av arbeiðinum inni í tunlinum.

Umframt verður so arbeittt við at gera vegirnar báðu megin tunnilin lidnar.

Í Leynum eru múrarnir og súlurnar til brúnna stoypt, meðan enn er eftir at stoypa dekk og yvirbygning. Eisini verður arbeitt upp á rundkoyringina við tunnilsmunnan Streymoyarmegin.

Í Vágum er tað stóra svingið omanvert Fútaklett, sum arbeitt verður við í løtuni. Spreingiarbeiðið er liðugt har, og fyllast skal nú út, so sjálv vegføringin kemur upp á pláss.

Eftir er so at gera vegin suður móti tunnilsmunnanum heilt lidnan í ovara borði, eins og eisini skal gerast liðugt har suðuri, sum byggiplássið hjá NCC var norðanvert munnan, sigur Niklas Foldbo, byggileiðari hjá P/F Vágatunlinum.

# Valdu ongan nýggjan borgarstjóra



*Tórur Johannesen hevur fyribils tikið sæti sum borgarstjóri á Sandi, til ein nýggjur er valdur. Tórur Johannesen hevur síðan seinasta val verið varaborgarstjóri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sands Bygdarráð atkvøddi týskvøldið fyri at geva Pálli á Reynatúgvu farloyvi úr bygdarráðnum á Sandi, har hann eisini er borgarstjóri. Men eingin nýggjur borgarstjóri varð kortini valdur, og varaborgarstjórin hevur fyribils tikið við leiðsluni í bygdarráðnum**

KOMMUNUMÁL

*Edvard Joensen*

Virkandi borgarstjórin á Sandi eitur Tórur Johannesen. Hann hevur verið varaborgarstjóri tað, sum farið er av valskeiðnum, og tekur nú fyribils við sum borgarstjóri, til val av nýggjum borgarstjóra hevur verið.

Tórur Johannesen, virkandi borgarstjóri, sigur, at bygdarráðið á fundi týskvøldið samtykti at geva Pálli á Reynatúgvu farloyvi frá øllum skyldum, hann hevur sum bygdarráðslimur og borgarstjóri á Sandi. Í tí liggur eisini, at hann er loystur úr øllum álitisstørvum, hann sum bygdarráðslimur hevur havt. Eitt nú sum umborðráðslimur í Føroya Kommunufelag.

Tórur Johannesen sigur, at hann gjørdi av, tá hann tók við, eftir at borgarstjórin hevði fingið játtað farloyvi, at slíta fundin og seinni at boða til nýggjan fund, har nýggjur borgarstjóri skal veljast.

Valt verður væntandi millum allar bygdarráðslimirnar, heldur Tórur Johannesen, og tað er ikki givið, at tað júst verður hann, sum varaborgarstjóri, sum verður valdur til nýggjan borgarstjóra.

Hinvegin er val av varaborgarstjóra ikki sett á skránna, tí hann er valdur fyri fýra ár, og verður Tórur Johannesen sitandi í hesum sessi, um hann væl at merkja ikki verður valdur borgarstjóri á komandi bygdarráðsfundi.

Tann fundurin er ikki ásettur enn, sigur Tórur Johanensen, men hann verður ikki í hesi vikuni.

Eftir at Páll á Reynatúgvu hevði fingið farloyvi frá bygdarráðnum, kom áheitan um at lata Olgu Fossdalsá taka sæti í bygdarráðnum. Hon varð uppstillað á listanum, sum Páll á Reynatúgvu varð valdur á, men kom ikki inn. Hon fekk sama atkvøðutal sum Eli Hentze, ið varð valdur við lutakasti.

Tórur Johannesen, virkandi borgarstjóri á Sandi, sigur, at tað tykist rættiliga ógreitt juridiskt, hvussu reglurnar við at geva borgarstjóra eru.

– Tað stendur vist ongastaðni nevnt í Kommunulógini, at ein borgarstjóri kann fara í farloyvi, sigur Tórur Johannesen. Men Páll á Reynatúgvu segði seg havi fingið loyvi frá rbeiðsgevara sínum, løgmanni, at fara í farloyvi frá borgarstjórastarvinum, og tað tók bygdarráðið so til eftirtektar, sigur hann.

